# Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús

## Slag av ogn

1. Reglurnar eru galdandi fyri útlutan av grundøkjum til sethús til egnan privatan bústað.

## Tilmelding

2. Tá nýggjar útstykkingar eru á veg, og grundøkini eru klár at luta út, boðar Tórshavnar kommuna frá hesum í fjølmiðlum og á heimasíðuni.
   b) Ásett verður freist á í minsta lagi 4 vikur, har til ber at melda til lutakast um grundøkini. Hjúnafelagar og sambúgvandi makar telja sum ein og sama tilmelding.
   c) Tilmeldingin fer fram á sjálvgreiðsluni á heimasíðuni hjá kommununi. Við tilmeldingini skal vera váttan frá peningastovni um, at tøk fígging er til ognina.

## Treytir

3. Treytirnar fyri at melda til og fáa tillutað rættin til eitt grundøki eru hesar:
   a) Ein skal vera fylt/ur 18 ár.
   b) Ein, ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki, skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis, t.d. saman við øðrum, gjøgnum partafelag ella á annan hátt, eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Hetta er tó ikki galdandi, um talan er um íbúð.
   c) Um ein ikki er danskur ríkisborgari, skal ein hava havt skrásettan bústað í Føroyum í minst 5 ár samanlagt.

## Lutakast

4. Rætturin til eitt grundøki verður avgjørdur við lutakasti, sum verður framt við talgildari skipan. Lutakastið kann fara fram alment, ella saman við tveimum óheftum eygleiðarum.
   a) Skilt verður millum fylgjandi bólkar av luttakarum í lutakastinum:
      1. Fólk, sum hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi dagin áðrenn tilmeldingin verður lýst alment, og føroyingar í lestrarørindum uttan fyri Tórshavnar kommunu, sum flyta til kommununa í seinasta lagi eitt ár eftir útlutan.
      2. Onnur, sum ikki hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu.
   b) Eru fleiri meldaði til lutakast, sum hoyra til bólk a1, enn tað eru grundøki at kasta lut um, verður bert kastað lut millum hesi.
   c) Eru færri meldaði til lutakast, sum hoyra til bólk a1, enn tað eru grundøki at kasta lut um, verður fyrst kastað lut millum tey í a1. Síðan verður kastað lut millum tey í bólki a2 um grundøkini, sum eru eftir.
   d) Grundøki, ið verða latin inn aftur til kommununa, verða lutað út í somu raðfylgju sum omanfyri. Verða grundøki latin inn aftur til Tórshavnar kommunu, eftir at øll tey tilmeldaðu hava fingið tilboð um grundøki, kunnu tøku grundøkini verða lýst til sølu á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu og hjá meklara.

e) Tekur ein ikki av rættinum til eitt grundøki, ein fær tillutað, so er ein ikki við í lutakastinum longur og kann ikki fáa tillutað rættin til annað grundøki í somu útstykking. Tó ber til at melda til lutakast av nýggjum, tá onnur útstykking verður framd í Tórshavnar kommunu.

f) Tað ber ikki til at býta um grundøki.

## Gjald og skeyting

5. a) Tá lutakast hevur verið verið, sendir kommunan øllum, ið hava vunnið rættin til eitt grundøki eina rokning við einum ávegisgjaldi áljóðandi helvtina av metta endaliga kostnaðinum á grundøkinum. Ávegisgjaldið skal rindast kommununi innan ásetta freist, ið ikki kann verða styttri enn 4 vikur. Er ikki rindað innan ásettu freistina, er rætturin til grundøkið fallin burtur, og kann Tórshavnar kommuna tilluta øðrum rættin til grundøkið.

b) Áðrenn skeytið uppá grundøkið verður skrivað og tinglýst, skulu hesar treytir vera loknar:

- Tórshavnar kommuna skal hava váttan frá peningastovni um, at fígging er tøk at byggja hús á grundøkið.
- Játtan um byggiloyvi skal vera fingin til vega.
- Keyparin skal vera skrásettur at búgva í Tórshavnar kommunu

c) Eru viðurskiftini viðvíkjandi pkt. 5b ikki avgreidd innan eina av Tórshavnar kommunu ásetta freist, ið ikki kann vera styttri enn eitt ár eftir lutakastið, er rætturin til grundøkið fallin burtur og kann Tórshavnar kommuna tilluta øðrum rættin til grundøkið sambært 4d.

d) Tá ið treytirnar í pkt. 5b eru loknar, fellir restin av gjaldinum fyri grundøkið til gjaldingar, og tá ið hetta er goldið, verður endaligt skeyti skrivað og tinglýst.

*Samtykt á fíggjarnevndarfundi 16. februar 2022 og á býráðsfundi 24. februar 2022.*